# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar

*11. januar fingu Elisabeth Antoniussen Ani, Tórshavn og Chukwudi Daniel Ani, Nigeria, búsitandi í Malmø, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4455 gr.*



1. februar fingu Ann og Jens Jákup Hansen, Tórshavn eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3375 gr.

2. februar fingu Birita og Jógvan H. Samuelsen, Miðvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2900 gr.

2. februar fingu Elsa Grønagarð og Búgvi Johannessen, Glyvrar, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2800 gr.

2. februar fingu Fríðgerð Olsen og Rani í Líð, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2800 gr.

2. februar fingu Alma Joensen og Dan Pedersen, Skáli, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4300 gr.

3. februar fingu Ann Vang og Heri Jakobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3650 gr.

3. februar fingu Lena Clemens Poulsen og Stefán M. Petersen, Streymnes, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3850 gr.

3. februar fingu Christianna Samuelsen og Jan Hansen, Stykkið, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3200 gr.

4. februr fingu Ingun Mørkøre og Jógvan Eidesgaard, Eiði, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4000 gr.

4. februar fingu Hergerð Geyti og Jonhard H. hansen, Saltangará, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 3700 gr.

5. februar fingu Karina Toftegaard og Birgir av Vollanum, Signabøur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4425 gr.

7. februar fingu Anja Berg Andersen og Petur Hendrik Reinert Djurhuus, Strendur, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 2850 gr.

8. februar fingu Kristianna S. Lamhauge og Johnny S. Johannesen, Streymnes, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 3000 gr.

### Krúndiamantbrúdleyp

Mikudagin 14. februar hava hjúnini Hassi og Silvurlýn Johannesen í Kollafirði verið gift í 65 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Kollafirði leygarkvøldið 17. februar kl. 18.00 har øll eru vælkomin.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Elisabeth Guttesen 50 ár



Týsdagin 30. januar fylti Elisabeth Guttesen í Havn 50 ár.

Elisabeth er Fuglafirði og útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur. Hon hevur búð í Havn seinastu umleið 30 árini, har hon hevur starvast á Landssjúkrahúsinum.

Hon er yngst av trimum systrum. Hinar eru Maria og Henrikka, sum báðar búgva í Fuglafirði. Foreldrini eru: Karolina (nevnd Utta) f. Danielsen, og Johannus Øregaard, bæði úr Fuglafirði.

Elisabeth er gift Hera Guttesen í Havn. Tey eiga tríggjar døtur: Herborg, Karolina og Hanna. Herborg býr í Aberdeen, Karolina í Keypmannahavn og Hanna í Havn.

Elisabeth hevur stóran áhuga fyri sangi. Hon hevur verið við í sangkórinum í Ebenezer í mong ár, har hon eisini er við í "Triple Trioini", sum onkur nevnir "De syngende husmødre". Henni dámar eisini væl at ganga langar túrar, bæði í bý og í haga.

Føðingardagin var Elisabeth burturstødd.

# Spírandi list í Smiðjuni

Hósdagin 8. februar læt áhugaverda listaframsýningin »Spírandi list« upp í Smiðjuni í Lítluvík. Tað eru roynd listafólk frá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla við Randi Gunnarsdóttir sum lærara ið sýna fram.

Talan er um 16 listafólk, sum sýna fram sínar málningar. Tey eru: Ólavur Thomsen, Anna Hansdóttir, Vera Bjørgvin, Jakobina Hansson, Hanna Samuelsen, Liss Højgaard, Maria Reynheim, Sólvá Jacobsen, Sámal av Reyni, Jóanes Olsen, Randi Túgvustein, Kristina á Rógvi Rasmussen, Lív Reynheim, Beinta Gaard, Nicolina Mortensen og Anna Maria Nyby.

Umframt málningarnar hevur Sólvá Jacobsen prýðislutir við á framsýningini.

Opið er frá kl. 14-18 gerandisdagar, leygardagin er opið frá kl. 10-18 og sunnudagin frá kl. 15-18. Framsýningin er opin til og við týsdagin 13. februar.


[redacted]

*Framsýningin »Spírandi list« hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla er í Smiðjuni í Lítluvík*

## Prógv

Tann 2. febr. 2007 fingu Robert Erling Frits Breyt Thomsen og Oddmar Martin Breyt Thomsen (beiggjar) prógv í »Bachelor of Science« á Aalborg universitet í Esbjerg. Á myndini standa beiggjarnir í miðjuni og stoltu foreldrunum Karl Arni og Sennøva Thomsen við hvør sína lið.

